kring oyggjarnar

Yvir 1000 íbúðir uttan baðirúm

Tað vóru í 1977 yvir 1000 íbúðir í Føroyum, sum ikki høvdu baðirúm. Og í 93 íbúðum var heldur ikki WC. Í 1977 vóru 739 íbúðir, sum ikki høvdu miðstøðuhita.

Hetta eru nøkur av teimum tølum, sum komu burturúr fólka- og íbúðateljingini í Føroyum tann 22. september 1977. Talið av íbúðum var henda dag 11.172.

Næstseinasta, slík teljing var, var í november 1970. Við at samanbera tølini frá báðum teljingunum, sæst, at tað gongur framá viðvíkjandi teimum saniteru viðurskiftunum og upphitingini í føroysku bústøðunum.

Í 1970 vóru 9.619 íbúðir í Føroyum. Av teimum høvdu slakar 2.000 onki baðirúm og 266 onki WC 2.066 høvdu ikki miðstøðuhita.


Tølini eru lutfalsliga størst í kommunum við færri enn 500 fólkum.

Handskrivað stuttsøgusavn

Høvdið uppundan eftir Hans M. Jacobsen er ein sjáldsom bók. Hon er handskrivað, av høvundanum sjálvum. Tað er sonur hansara, Jákup á Fløtti Jacobsen, sum gevur bókina út.

Í bókini eru 30 stuttsøgur. Tær eru »flest allar sannar og úr dagliga lívinum, niðurskrivaðar av faðir mínum, sum hann hoyrdi eldri fólk siga frá«, skrivar Jákup á Fløtti Jacobsen í fororðinum.

Høvdið uppundan er 43 blaðsíður. Hon er prentað á Klaksvíkar prentsmiðju og kostar 20 kr. í linari permu.



Ein síða úr bókini. Skriftin er løtt at lesa

2.436 sóu Barn í Føroyum

2.105 vaksin og 131 børn sóu ólavsøkuframsýningina hjá Fornminnissavninum, Barn í Føroyum. Savnið er nøgt við undirtøkuna, verður upplýst í Mondli, sum kom út mikudagin.

Framsýningin hevur bert verið í Havn. Men feløg, skúlar og onnur út um landið, kunnu eisini lána hana. Framsýningin er løtt at flyta og seta upp og hon krevur uml. 30 metrar av veggi at hanga á.

Gyllin og D-markar til sethúsabygging

— Lán uppá 25 mill. kr. til Húsalánsgrunnin undirskrivað. Blaðgrein tarnaði samráðingunum.

Hósdagin fór Hergeir Nielsen, landsstýrismaður til Keypmannahavnar at undirskriva lánini, sum landskassin hevur tikið til Húsalánsgrunnin. Læntar eru 25 mill. kr. og er onnur helvtin fingin í Hálandi og hin í Vestur-Týsklandi. Den Danske Bank er millumbanki. Lánini skulu gjaldast aftur yvir 15 ár og tann effektiva rentan er uml. 10%.

Hetta eru lagaligastu lán, sum í løtuni eru at fáa, sigur Hergeir Nielsen.

Landsstýrið fekk í ólavsøkutingsetuni heimild frá løgtinginum at veðhalda landskassans vegna fyri uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 25 mill. kr.

Tá hesin peningur kemur afturat, verður grunnurin førur fyri at veita tvífald so stór útlán sum áður í tíðarskeiðinum 1. juli 1979 — 31. mars 1980, metir landsstýrið.

Blaðgrein tarnaði

Samráðingarnar um tað hálendska lánið steðgaðu eina tíð. Orsøkin var ein grein í Berlingske Tidende, sum Uffe Elleman Jensen skrivaði í summar. Hann var í Føroyum í samband við ein fund, sum Realkreditturin hevði. Heimáfturkomin skrivaði hann greinina »Færøerne — en skidt forretning«. Har hevði hann upplýsingar um gjaldsjavnan hjá Føroyum. Hann skrivar eisini, at Smyril hevur havt eitt rakstrarhall hesi fýra árini uppá 8 mill. kr.


— Hetta er ikki rætt, sigur Hergeir Nielsen.

— Ein tílík grein fer út í finansverðina, og hon gjørdi, at samráðingarnar um hálendska lánið steðgaðu. Men tá vit høvdu fingið greitt teimum frá, hvussu tey veruligu viðurskiftini eru hjá okkum, var alt í lagi beinanvegin, sigur landsstýrismaðurin.

Nýggj útstykkingarætlan — endurskoða býarplanin

Runavíkar kommuna hevur í umbúna at gera eina útstykkingarætlan innanlaga á Glyvrum.

Býráðið hevur havt samráðingar um keyp av eini trøð frá Per Jacobsen. Keypssáttmáli er ikki undirskrivaður enn, so tað er ikki nærri ásett, nær útstykkingin verður framd.



Tað er so nógv bygt í Runavíkar kommunu seinastu árini, at bústaðarøkini á býarplanínum skulu viðkast

Runavíkar kommuna fær javnliga umsóknir um grundstykki. Býráðsformaðurin, Dia P. Johannesen, upplýsir, at tað liggja ikki nógvar umsóknir og bíða. Kommunan hevur klára at útvegað grundøkir so hvørt.

Annars hevur tað vist seg, at bústaðarøkini á býarplaninum fyri Runavíkar kommunu eru ov trong.

Tí verður býarplanurin endurskoðaður í løtuni, samstundis sum hann verður víðkaður.

Bygdirnar Rituvík og Søldarfjørður eru við at vera komnar undir land. Tað er Tróndur Fuglø, sum ger arbeiðið.

bøkur og bløð

Færøyske fortellere

Gyldendal í Norra hevur givið út eitt savn av føroyskum stuttsøgum, umsettar av Hedin Brønner. Høvundarnir eru M.A. Winther, Sverri Patursson, Hans Dalsgaard, Martin Joensen, William Heinesen, Heðin Brú, Karsten Hoydal, Jens Pauli Heinesen, Steinbjørn B. Jacobsen og Gunnar Hoydal. Ein stutt frágreiðing er um hvønn høvunda.

Eisini hevur Hedin Brønner eitt stutt yvirlit yvir føroyska bókmentasøgu. Hann hevur eisini ein lista yvir bøkur og greinar um føroyskar bókmentir. William Heinesen hevur gjørt teikningarnar í bókini og kápumyndina.

Færøyske fortellere er 231 síður til støddar.

Millum triðing og helvt minni

Úr Bø frættist, at í ár bleiv til býtis skorið millum triðing og helvt minni enn í fjør.

Miðalvektin liggur um 3 pund lægri enn vanlig ár.

Tveir hagapartar hoyra til Bø. Tað ringa várið týndi tilsamans eini hálvthundrað seyðir.